# TWR – KVINNUR VIÐ VÓN

## Bønaráheitanir fyri juli 2024 – Eystur- og Suðurafrika

1. Harri, hjálp teimum, ið eru offur fyri menniskjahandli, at skilja, at tey verða útnyttað. Lat tey tíðliga varnast útnyttingina og koma í samband við tey, ið kunnu hjálpa. (Lukas 4:18)
2. Harri, varðveit einkjur og uppihalt teimum, sum búgva í Eysturkappa landslutinum í Suðurafrika, og sum eru illa viðfarnar av familjum sínum og stríðast fyri at yvirliva. (Filippibrævið 4:19)
3. Vit biðja, Gud, fyri kvinnum í Burundi, sum verða lastaðar fyri at steðga familjuættini, tí tær einans hava átt gentur og ikki dreingir. (1.Mósebók 1:27)
4. Faðir, vit biðja, at tú vilt hjálpa *TWR Kvinnur við Vón* at stovna eina trúartænastu í Eswatini. (Rómbrævið 12:6-8)
5. Gud, vit biðja, at ungir menn og ungar kvinnur í Tansania, ið fáa prógv á lærdum háskúla í juli, mugu fáa arbeiði. (Orðtøkini 16:9)
6. Harri, nógvar barnabrúðrar í Somalia líða í sambandi við truplan barnsburð, ið eisini kann føra til deyða. Vit biðja, at mentanin má broytast, so at gentur verða vardar frá óhóskandi ungum giftarmálum. (Sálmur 138:7)
7. Alvaldandi Harri, vit biðja fyri Amhara økinum í Etiopia, at kríggið má steðga. Gev teimum, ið har búgva, Tín frið. (Esaias 2:4)
8. Gud, verj kvinnur og børn í Simbabvi frá sálarløstum, ið standast av, at menninir í vónloysi falla til drykkjuskap og rúsevnismisnýtslu. (Orðtøkini 23:20-21)
9. Gud, vit biðja, at fleiri kvinnur í Botsvana velja Kristus og fáa eitt inniligari samband við Hann, og at lív teirra má hava eitt endamál. (Efesusbrævið 2:10)
10. Faðir, takk fyri lurti-tólini, ið verða drivin við sólorku, og at kvinnur í bygdaøkjum í Suðurafrika hava fingið tey. Lat tær, sum lurta eftir *Kvinnur við Vón* sendingum, vaksa andaliga. (2. Pætursbræv 3:18)
11. Harri, verj børn í Burundi, sum hava autismu, og sum mangan verða misskilt og sligin. Hjálp foreldrunum at skilja, hví børn teirra ikki klára seg væl í skúlanum. (Sálmur 46:2 enskt: 46:1)
12. Gud, vit venda okkum til Tín um at lata tað regna í Eswatini, og vit biðja serstakliga fyri teimum, sum hava landbrúk sum livibreyð. (3. Mósebók 26:4)
13. Himmalski Faðir, vit biðja, at Tú vilt forkoma vandamiklum siðvenjum, sosum umskering av gentum í Tansania. (Kolossebrævið 2:8)
14. Faðir, takk fyri, at dyr eru latnar upp, so at evangeliið kann verða boðað í Somalia. Nýt TWR *Kvinnur við Vón* í Tínari tænustu har í Jesu navni. (Markus 13:10)
15. Gud, vit biðja Teg um at verja kvinnur og børn í bygdum og býum í Suðurafrika, har nógv verða dripin av ránsmannaliðum. (Sálmur 18:3 – ensk:18:2)
16. Harri, í Etiopia er álvarsom hungursneyð, tí har er fíggjarlig kreppa. Veit fátækum familjum, einkjum og einkjumonnum hjálp, teimum, sum ikki sjálv hava ráð til at breyðføða sínum. (Lukas 3:11)

17. Gud, styrk tey gomlu í Simbabvi og uppihalt teimum, sum síggja uppsparingar sínar svinna av inflasjón, og sum kenna, at familjurnar ikki taka sær av teimum. (1.Timoteusarbræv 5:8)
18. Faðir, gev kvinnum og monnum í Botsvana styrki og eina tráan at vera fráhaldandi og velja giftarmál heldur enn at liva saman ógift. (1. Korintbræv 7:2)
19. Faðir, vit biðja Teg, at styrkja tær kvinnur í Suðurafrika, sum eru í harðligum parløgum, og geva teimum mót. (5.Mósebók 31:6)
20. Gud, ger, at *Kvinnur við Vón* sendingar kunnu varpast út í Burundi, so kvinnur kunnu læra um, hvussu børn mennast. (Orðtøkini 18:15)
21. Harri, vit biðja fyri gentum í Estwatini, ið eru lidnar við miðnám og hægri útbúgving. Hjálp teimum at finna starv, so tær kunnu forsyrgja sær sjálvar. (Efesusbr. 3:20-21)
22. Faðir, vit biðja, at valini úti um landið til at velja stjórn í Tansania, ið skulu verða í oktober í ár, mugu fara friðarliga fram. (Matteus 5:9)
23. Harri, lat kvinnur í Somalia verða vardar frá harðskapi og forfylging í heimum sínum. Broyt hjørtuni á teimum, sum ikki virða kvinnur, og sum vilja gera teimum ilt. (Sálmur 140:2 – ensk: 140:1)
24. Faðir, vit yvirgeva TWR *Kvinnur við Vón* í Simbabvi til Tín. Fyll og endunýggja fyribiðjarar við Heilaga Andanum. (Sálmur 42:2 – ensk: 42:1)
25. Gud, verj kvinnur í Etiopia móti ránsmonnum, sum drepa tær. Lat hesar brotsmenn verða fangaðar og revsaðar. (Orðtøkini 18:10)
26. Gud, vit biðja, at fleiri menn í Botsvana vilja koma til Kristus og gerast andaligir leiðarar í heimum sínum. Lat teir verða konum sínum trúgvir. (Efesusbrævið 5:23)
27. Faðir, vit biðja fyri kvinnum, sum liva í størstu armóð í Suðurafrika. Lat tær fáa atgongd til arbeiði, stuðul frá stjórnini, og sosiala hjálp, so tær kunnu koma út úr fátækradøminum. (Sálmur 34:7 – ensk: 34:6)
28. Gud, vit biðja, at samkomuleiðarar í Tansania vilja eggja teimum trúgvandi til framhaldandi at stuðla TWR *Kvinnur við Vón* trúartænastuni. (Filippibrævið 4:15, 17)
29. Faðir, nógvar kvinnur í Burundi eru arbeiðsleysar og duga hvørki at lesa ella skriva. Lat tær fáa arbeiði, so tær kunnu breyðføða børnini og familjuna**.** (2.Korintbræv 9:8)
30. Harri, vit biðja, at Heilagi Andin kann virka umvending, fyrigeving og sátt og semju, so familjur í Simbabvi, sum eru sindraðar, kunnu sameinast aftur. (Efesusbr. 4:31-32)
31. Himmalski Faðir, vit biðja, at kvinnur í Botsvana venda sær frá avgudadyrkan og forfedra dyrkan til at tilbiðja Teg sum tann einasta sanna Gud. (3. Mósebók 26:1)

***KVINNUR VIÐ VÓN***

**twrwomenofhope.org**

# At sameina hjørtu okkara í bøn

## Eystursíðan og Suðurendin av Afrika

## TWR *Kvinnur við vón* útvarpssendingar bera við sær vón og umbroyting

**Eftir Sphiwe Nxumalo-Ngwenya, økis samskipara í Afrika**

” Tey komu til hús okkara at skurðviðgera meg, tá ið eg var einans sjey ára gomul. Tað var fyri meg ein skelkandi viðgerð; í 21 dagar hevði eg øgiliga pínu og kvøl eftir ræðuliga inntrivið. Tey nýttu hita fyri at tryggja sær, at eg kom fyri meg, eftir at eg var skorin og seymað. Eg minnist hetta at vera hin mest pínufulla hending, ið eg nakrantíð havi upplivað,” sigur Kaiya frá.

Eins og hjá mongum kvinnum í Somalia, hevur skurðviðgerðin av kynsgøgnunum**,** sum partur av kvinnuligu umskeringini, ið skamfílar kvinnuligu kynsgøgnini (FGM: Female Genital Mutilation)*), ført til nógva kropsliga pínu hjá Kaiyu saman við stórum sálarligum avleiðingum. Í uppvøkstrinum og sum vaksin hevði Kaiya pínu og trupulleikar í sambandi við menstruatión, og tá ið hon var saman við manni sínum, og eisini í sambandi við barnsburð. Hon eigur sjey børn, fýra av teimun eru gentur.

“Hóast tað var ein pínufull uppliving, ið mær var fyri,” heldur Kaiya fram at siga frá, “kundi eg ikki forða fyri, at hetta varð framt móti tveimum av døtrum mínum. Um tað mundið var eg ávirkað av sterkum, mentanarligum siðvenjum og átrúnaði. Av ótta fyri at vera øðrvísi og vera atvold til trupulleikar fyri døtur mínar og familjuna, gav eg eftir fyri sosialum trýsti.”

Mentanarliga miðjar kvinnulig umskering ímóti at tryggja gentum og kvinnum sosiala tign, reinleika og møguleika at giftast. Henda mannagongd er eitt úrslit av átrúnaði, ið tvíheldur um, at kvinnur og gentur, ið ikki eru umskornar, liva í ólevnaði, eru ikki likamliga reinar, og tí vil eingin hava tær.

“Eg hoyrdi av tilvild eina útvarpssending, ið nevndist *Rajada Dumarka (Kvinnur við Vón)* á málinum, sum tosað verður í Somalia. Eg lærdi nógv av at lurta eftir hesi sending. At eg hoyrdi um Jesu Kristi kærleika og gjørdist Guds barn, linnaði so líðandi um mín ótta. Eg trúði Honum (Jesusi), og kann nú standa stinn í Frelsaranum, tí eg veit, at, Hann er hjá mær.”

“Gjøgnum útvarpssendingina fekk eg eisini at vita, hvussu vandamikil kvinnu-umskering er. Eg eri fegin um at siga frá, at yngru døtur mínar sloppu undan hesari siðvenjuni at verða umskornar. Eg setti meg upp ímóti tí fyri at verja døtur mínar. Eg havi tryggjað mær, at allar ommudøtur mínar ikki skulu uppliva slíkt. Eg veit, at Jesus Kristus fer at geva teimum tann rætta mannin, ið fer at elska tær, hóast tær ikki eru komnar undir siðvenjuna at verða umskornar,. Eg haldi fram við at lurta eftir hesi útvarpssending, ið hjálpir mær at vaksa í kunnskapinum um Kristus, sum gevur mær treysti at gera tað, ið rætt er, og verja gentur við at tala teirra søk.

*Kvinnur við Vón* heldur fram við at umbroyta einstaklingar og mentanir gjøgnum sína frálæru um andaligar sannleikar.

## *) Frágreiðing um FGM

WHO (World Health Organisation) Heimsheilsustovnurin hevur 5. februar 2024 hesa frágreiðing um hesa siðvenju:

- Meir enn 230 milliónir av gentum og vaksnum kvinnum, sum eru á lívi nú, hava fingið kvinnuliga umskering (FGM) í 30 londum í Afrika, Miðeystri og Asia, har FGM enn verður framd.
- FGM (kvinnulig umskering av kynsgøgnunum) verður helst gjørd við smágentur upp til 15 ára aldur og hendinga kvinnur í miðal aldri.
- FGM (kvinnuliga umskeringin) ger seg inn á mannarættindini hjá gentum og kvinnum.
- Viðgerð fyri heilsutrupulleikar av FGM (kvinnuligari umskering) verður mett at kosta heimsheilsuskipanini 1.4 milliard í U.S. dollarum um árið, eitt tal, ið væntandi veksur, um ikki átroðkandi stig verða tikin til at forbjóða hesum siði.

**FGM (kvinnulig umskering) verður vanligast framd í Guinea og Somalia**

***KVINNUR VIÐ VÓN*** **(twrwomenofhope.org)**

**Undirvísa, lívga, útgera kvinnur til at læra, biðja, lurta, vaksa og geva**

**Fíggjarstuðul:**

**EvR (Evangeliska Røddin) hevur konto í Betri Banka nr. 9181 000 533 7145**

**til at flyta pening tilskilað til TWR (Trans World Radio).**

**Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR.**

**TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia — twre@twr.org**